# Altjóða tannrøktaradagur

**9. oktober 2002 varð hildin sum altjóða tannarøktaradagur kring allan heim**

TANNARØKT
*Tíðindaskriv*

Hetta er ein dagur, har fokus verður sett á fyribyrgjandi tannarøkt og tannheilsu.

Í Føroyum eru umleið 20, sum hava tikið útbúgving sum tannarøktarar, harav 15 í dag eru í vinnu innan fakið.

### Tannarøktari - hvat er tað?

Tannarøktararnir eru ein sjálvstøðugur bólkur innan tannheilsuarbeiðið. Høvuðsuppgávan er fyribyrgjandi tannarøkt, bæði hjá børnum, vaksnum og gomlum fólki. Arbeiðsøkið hjá tannarøktarunum er frálæra um tannarøkt á skúlatannalæknastovum, frálæra, kanning og viðgerð, so sum tannreinsing, á privatum tannlæknastovum, undirvísing av starvsfólki innan heilsuøkið um munn- og tannarøkt, og undirvísing í fólkaskúlanum.

Teir fyrstu tannarøktararnir komu til Føroya miðskeiðis í 1970'unum, og síðan hevur tørvurin á tannarøktarum verið støðugt vaksandi, bæði innan almennu barnatannrøktina og privatu tannlæknastovurnar. Í løtuni er ongin tannarøktari arbeiðsleysur í Føroyum.

Í 1999 kom lóg í gildi, sum heimilar tannarøktarum at arbeiða sjálvstøðugt í egnari røktarastovu, men enn er ongin, sum hevur gjørt brúk av hesum møguleika.

Ein tann týdningarmesti tátturin hjá tannarøktarunum, er at arbeiða við fyribyrgjandi tiltøkum. Føroysku tannarøktararnir hava millum annað eitt gott samstarv við Mjólkarvirkið Búnaðarmanna á hesum øki.

Seinasta átakið í hesum samstarvinum var ein áheitan á mjólkapakkunum, sum skuldi fáa børn og ung at drekka meira mjólk.



*Í Føroyum eru 15 tannarøktarar, sum starvast bæði á skúlatannlæknastovum og saman við privatpraktiserandi tannlæknum. 12 av teimum eru savnaðar á myndini.*

## Niels Winther formaður hjá búskapar- og løgfrøðingunum

FAKFELAG
*Tíðindaskriv*

Búskapar- og Løgfrøðingafelagið hevur havt aðalfund, og nýggj nevnd varð vald. Í henni sita Bergur Berg (fráfarandi formaður), Hans Ellefsen, Hilmar Høgenni og Niels Winther, sum halda áfram í nevndini og Atli Leo og Esther Dahl, sum eru nývald.

Úr nevndini eru farin Johnhard Klettheyggj og Kristina Samuelsen.

Nevndin hevur nú skipað seg við Niels Winther sum formanni, Hans Ellefsen sum kassameistara og Esther Dahl sum nevndarskrivara.

## Til minnis um Janus á Toft

Tað kom eitt sindur dátt við, tá ið eg frætti, at Janus á Toft var farin. Tá ið eg hevði summað meg eitt sindur, komu minni fram fyri meg. Mær rann í huga, hvussu stóra ávirkan hesin dalbingur hevur havt á meg, uttan at eg havi hugsað um tað.

Gekk man sum smádrongur og keddi seg, kundi ein altíð fara inn til Janus. Møttust vit í skúlatúninum, kundi ein altíð spyrja hann um veðrið. Tað gjørdi eg ikki við onnur vaksin. Aldri veit eg um, at hann hvesti eftir okkum smádreingjum. Altíð hetta seigliga ja, ja, jú, útnyrðingurin plagar at vera góður. So spældu vit aftur, glaðir um, at dagurin fór at halda sær.

Sum ungur, tá ið eg fór at teljast millum teir, ið kundu gera nyttu, hevði Janus eisini sín leiklut í gerandisdegnum. »Far og hjálp Janusi við oljutunnunum, tak flaggið niður fyri hann, sig honum, at dansurin ella møti byrjar« o.s.fr. Altíð fór ein fegin avstað, tí ofta var hansara litfagri verumáti orsøkin til mangan stuttleika.

Saknur verður í honum í kirkjuni, hansara frálíku rødd. Eg síggi hann fyri mær á triðju brík inni við veggin.

Eg kom at hugsa um orðini »Maður legst lík, men ei doyr minni mans«.

Janus fer at liva mær í minni sum nakað gott. Hann hevur strítt sítt stríð í Gudrøknum tolni. Ikki hevur tað altíð verið lætt. Kaldar vetrarmorgnar, ringur av gikt, tó altíð við einum tíðindafróðum verumáta, um tú møtti honum.

Friður veri við minninum um Janus á Toft.

*Jónleif*

# Barnaprix á Oyrarbakka leygardagin

**Eydnan á Oyrarbakka verður karmur um næstseinasta undanumfarið í Nosabarnaprix 2002**

NÓSABARNAPRIX
*Tíðindaskriv*

Leygardagin tann 12. oktober verður aftur eitt innleiðandi umfar í »Nósabarnaprix 2002«.

Tað eru børnini í Norðurstreymoy, sum nú skulu á pallin, og er tað eisini fullteknað hesaferð.

Tiltakið verður í Eydnuni á Oyrarbakka og byrjar kl 19.

Tá hetta umfarið er liðugt, er bert eitt umfar eftir til finaluna, sum verður á Kambsdali 9. november. Tey, sum longu eru komin víðari fara í upptøkustudio at byrja upptøkurnar til fløguna, sum kemur út tann 12. november.

Fløgan verður givin út í samstarvi við høvuðsstuðulin, Føroya Banka, og 3'aran í SMS. Í hesum sambandi verður stórt tiltak á torginum í SMS sama dag sum fløgan kemur á marknaðinum.

Allir luttakarar fara at upptraðka og signera fløgur, og okkurt annað spennandi verður eisini á skránni, siga fyrireikararnir.




# Jógvan við Keldu á ST aðalfund

ST-AÐALFUNDUR
*Eirikur Lindenskov*

Fríggjadagin fer Jógvan við Keldu, løgtingsmaður Fólkafloksins, til New York á aðalfund hjá ST. Seinasta mánaðin hevur Katrin Dahl Jakobsen, tingkvinna Javnaðarfloksins umboðað Føroyar í new York

Føroyskir tinglimir hava tveir sessir í donsku sendinevndini í sambandi við aðalfundin hjá ST í New York.

Meðan Jógvan við Keldu verður í New York, røkir Rúna Sivertsen í Klaksvík tingarbeiði sum varðatingkvinna hjá Fólkaflokkinum í Norðoyggjum.

Jógvan við Keldu verður burturstaddur í ein mánað.



*Komandi mánaðin skal Jógvan við Keldu umboða løgtingið á ST aðalfundinum í New York. Seinasta mánaðin hevur Katrin Dahl Jakobsen verið á aðalfundinum*



Burger King, Sunset Boulevard og Perlan latið upp:

# Kapprenning um at gerast fyrstur




*Niels Mortensen, stjóri í SMS, og Jan Christiansen, borgarstjóri, í nýggju Burger King matstovuni í SMS*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Fyrrapartin í gjár lat nýggja matarøkið í SMS um. Nógv fólk, mest ung, vóru komin niðan at síggja og royna nýggju matarstøðini**

MATSTØÐ
*Ingrid Bjarnastein*

Jan Christiansen, borgarstjóri, fekk æruna at klippa tað reyða, hvíta og bláa bandið inn til ávíkavist Perluna, Sunset Boulevard og Perluna.

Ein rúgva av fólki var komið saman uppi í SMS fyrrapartin í gjár, mikudagin, tá nýggju matarstøðini hjá SMS lótu upp. Seinastu tíðina hevur onki rættiligt matarstað verið í sølumiðstøðini, men í gjár fingu kundarnir ikki minni enn trý matarstøð at velja ímillum.

Skúlarnir hava helst verið tómligir henda morgunin, tí flestu fólkini, ið vóru komin saman, vóru ung.

### Skjót tænasta

Tey trý matarstøðini standa øll lið um lið. Tað er lagt upp til góða og skjóta tænastu, so bíðitíðin verður so stutt sum møguligt. Eisini eru nógv góð sitipláss til allar teir ymsu kundarnar.

Nýggir reyðir, bleytir stólar eru settir upp, og minnir hetta ikki sørt um sølumiðstøðirnar í útlondunum nú.

Nýggju matarstøðini eru liður í fyrsta um- og útbyggingarstigið hjá SMS.

Týðiligt var, hvat var best umtókt. Røðin í Burger King, var nógv tann longst, men eisini í Sunset Boulevard høvdu tey úr at gera.

Nýggi roykipolitikkurin í SMS er eisini í nýggju matarstøðunum. Bert eitt lítið pláss er sett av til roykjararnar, so nú eru ikki-roykjararnir veruliga við yvirlutan.



*Teir báðir, Magnus, 16, og Erik, 14, vóru fyrstu kundarnir tá Burger King læt upp deild í SMS*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Giktadagur
á torginum í SMS

Mánadagin 14. okt. 2002
skipar apotekið fyri giktadegi,
við í tiltakinum verða:

- Giktafelagið
- Hjálpartólamiðstøðin
- Ergo- & hjálpartól
- Tjaldurs Apotekið

Tjaldurs Apotek
Tlf. 34 11 00
www.apotek.fo